# Neistin

**HONDBÓLTUR** Neistin var lítið sannførandi fyri steðgin, men í seinna hálvleiki prógvaði høvuðsstaðarliðið, at tað er stórur munur á toppi og botni í bestu kvinnudeildini

Uni Holm Johannesen



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað tók sína tíð, áðrenn Neistin fór upp í ferð í høllini á Hálsi leygardagin.

StÍF tykist hava mist fótafestið í hesum kappingarárinum. Bara eitt stig er komið í skjáttuni higartil. Tað eydnaðist at fáa javnt móti Tjaldrinum á útivølli. Úrslitið var, at felagið úr Runavík segði sín venjara úr starvi.

Botnliðið og Neistin togaðust hinvegin um leiðsluna fyrstu longu løtuna. Tað sá ljóst út hjá StÍF, tá Fríðrún Danielsen smekkaði bóltin í netið aftaná 20 minuttir. Tá vóru gestirnir av Strondum á odda 7-6.

Tað var lítið veiggj í álopsspælinum hjá Neistanum. Heimaliðið gjørdi fleiri mistøk í uppspælinum, og tað gav gestunum neyðugu møguleikarnar.

Seinastu løtuna undan steðginum fekk heimaliðið heili fimm mál upp í slag. Neistin var á odda 11-7 í steðginum.

Í seinna hálvleiki øktist munurin støðugt millum liðini.

### Stríðast við Tjaldur

Umframt Stjørnuna, eru Neistin og Tjaldur bestu boðini at vinna seg í finaluna um føroyameistaraheitið.

Tjaldur og Neistin renna aftaná oddaliðnum í løtuni. Tað vísir seg, at ovastu liðini missa bara stig í innanhýsis dystunum. Tjaldur hevur vunnið fýra ferðir upp í slag, og Neistin hevur vunnið tríggjar ferðir upp í slag, sum støðan er.

Leygardagin verður grannauppgerð í Havn. Tá spæla Kyndil og Neistin í høllini á Hálsi. Stjørnan og Tjaldur spæla eisini tá.

Tað eru seinastu dystirnir fyri jól. Tá er kappingin hálvrunnin.

# Úrslitið hevði lítið at týða

**HONDBÓLTUR** VB og VÍF hava lítið at skula sagt í annað hvørt oddastríðnum ella botnstríðnum í hesum kappingarárinum. Tí broytti úrslitið lítið og einki á stigatalvuni

Uni Holm Johannesen

VB og VÍF eiga lítlan leiklut á stigatalvuni í løtuni.

Bæði liðini hava vunnið seg burtur frá aftasta plássinum, men kvinnurnar úr Vági og Vestmanna hava langan tein upp til ovastu liðini.

Tí er uppgávan hjá VB og VÍF at fáa ungu leikararnar royndar, og kanska gera ein vørr móti ovastu liðunum. Fremst av øllum ræður um at brynja liðið til næsta kappingarár.

Tað er ikki altíð eins stuttligt at spæla, tá tú hevur lítið og einki at spæla fyri. Tað er støðan hjá VB og VÍF, nú kappingin skjótt er hálvrunnin.

VB hevur fótin framman fyri kvinnurnar úr Vestmanna. Tað varð staðfest í høllini í Vági.

### Greiður sigur

VB vann greitt við 10 málum.

Tað var miðskeiðis í fyrra hálvleiki, at heimaliðið fór undan gestunum. VÍF fekk ikki mál í níggju minuttir, og so fór VB avstað.

Kvinnurnar úr Vági fóru frá 4-4 til 10-4. Gestirnir svaraðu ongantíð aftur, og greiða leiðslan var ongantíð í vanda.

### Átta stig á muni

VB hevur átt virknan leiklut í oddastríðnum seinastu kappingarárinum.

Soleiðis er ikki í ár.

Vágskvinnur eru átta stig frá finaluplássinum í løtuni. Tær hava sjáldan bjóðað ovastu liðunum av í innanhýsis dystunum, og tað røkist einki fyri, at tær fara at vinna seg upp millum fremstu liðini.

VB vitjar hjá botnliðnum StÍF næsta vikuskiftið.

VÍF er longu farið í jólafrí. Tær spæla aftur tann 8. januar í 2011. Tá vitja tær eisini hjá StÍF.

*uni@sosialurin.fo*

# Trygvi framvegis fulla úrtøku

**HONDBÓLTUR** Kyndil misnýtti trý brotskøst upp í slag í seinna hálvleiki. Tá vann Tjaldur sær ein greiða leiðslu, sum gestirnir ongantíð hóttu. Kvinnurnar úr Runavík hava nú vunnið fimm ferðir upp í slag

Uni Holm Johannesen

Tað hevur gingið strúkandi hjá Tjaldur síðan 11. november.

Tá fóru kvinnurnar úr Runavík sera vónbrotnar av vøllinum. Javnleikurin á heimavøllinum móti StÍF staðfesti, at Tjaldur noyddist at skifta kós.

Nevndin tók skjótt avleiðingarnar. Bogdan Burcea var sagdur úr starvi.Trygvi Mortensen loysti hann av.

Tjaldur hevur síðan koppað Neistan, VB, StÍF, VÍF og Kyndil.

Kvinnurnar úr Runavík eru stórspælandi í løtuni.

Um tær eru besta liðið í fremstu kvinnudeildini, sum støðan er, fáa vit eina ábending um næsta vikuskifti, tá oddaliðið Stjørnan vitjar í Runavík.

### Tað seinasta restar í

Uppflytararnir úr Kyndli hava verið drúgvar í hesum kappingarárinum.

Ungu kvinnurnar eru ágrýtnar og ræðast ikki at bjóða teimum bestu av. Tað hevur higartil givið 10 stig í skjáttuna.

Tað er ein sannroynd, at tað seinasta restar í hjá Kyndli. Liðið gav Stjørnuni dygga mótstøðu seinast, men tær dugdu illa at handfara støðuna, tá trýstið var mest. Kyndil var á odda, tá lítil løta restaði í, men drúgvu royndirnar hjá klaksvíkskvinnum var munurin tá avtornaði.

Drúgvu royndirnar tóktust aftur vera á muni hesaferð.

Gestirnir úr Havn vóru á 18-17, tá átta minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki. Sjey minuttir, og trý misnýtt brotskøst seinni, var Tjaldur á odda 22-18.

Tað tóktist vera ein dyggur smeitur hjá Kyndil, sum ikki fekk fótin fyri seg aftur.

Sjey mál vóru á muni, tá dysturin var liðugur. Tjaldur vann 32-25.

### Trygvi í viðgongd

Trygvi Mortensen og Tjaldur hava greitt allar uppgávurnar til lítar higartil.

Kvinnurnar úr Runavík hava spælt móti øllum liðunum, uttan Stjørnuni, meðan Trygvi Mortensen hevur staðið við róðrið.

Næsta vikuskifti vitjar Stjørnan í Runavík. Kvinnurnar úr Klaksvík vunnu lætt á StÍF seinasta vikuskiftið. Tær spældu ikki hesaferð. Stjørnan hevur tískil ikki spælt ein torføran dyst í tríggjar vikur, men bara vant, áðrenn dystin móti Tjaldri.

Tað verður helst ein fyrimunur hjá Tjaldri, sum eltir oddaliðið á stigatalvuni.

*uni@sosialurin.fo*

## VB – VÍF 28-18

(14-8)

Vágshøll, Vágur

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 4-3**
**20 min.: 10-5**
**40 min.: 15-10**
**50 min.: 20-14**

**VB:** Justina Balzarviciute 9, Gintare Lydekaite 6 (1), Svava Vestergaard 3, Una Egilsdóttir 3, Theresa Joensen 2, Andrea Nielsen 2, Rannvá Johannesen 2, Monkia Samuelsen 1.
VÍF: Liljan Djurhuus 7 (3), Torgunn Johansen 4, Tóra Seloy 2, Randi Virgarsdóttir 1, Agnas Olsen 1, Elisa Leo 1, Rakul Joensen 1, Linda Davidsen 1.
**Útvísingar:** VB 2 – VÍF 3

## Neistin – StÍF 27-16

(11-7)

Høllin á Hálsi, Tórshavn

Dómarar: Hanus Kúrberg og Heri Petersen

**10 min.: 3-5**
**20 min.: 6-7**
**40 min.: 17-13**
**50 min.: 22-14**

**Neistin:** Barbara Brauer 10, Rakul Magnussen 3, Jacklin Durhuus 3, Bára Hansen 2, Marjun Danberg 2, Sandra Bakanova 2, Anja Eliasen 2, Elin Holm 1, Birita Wardum 1, Katrin á Neystabø 1.
**StÍF:** Birna Tummasardóttir 7, Bára Berthelsen 4, Fríðrún Danielsen 2, Oddrún Danielsen 1, Birita Poulsen 1, Liljan Gregersen 1.

## Tjaldur – Kyndil 32-25

(15-14)

Høllin í Runavík

**10 min.: 4-3**
**20 min.: 8-9**
**40 min.: 19-18**
**50 min.: 26-20**

**Tjaldur:** Adina Petrea 10 (1), Simona Petersen 6 (1), Cornelia Rimbu 6, Annika Thomsen 5, Jóhanna í Króki 2, Benadikta Johannesen 1, Heidi Sevdal 1, Sarah Ann Thomsen 1.
**Kyndil:** Jórun Ludvig 7, Heidi Maria Akselsen 5, Guðrun Eystberg 3, Ásleyg Súnadóttir 2, Anja Heinadóttir 1, Turið Arge 1.
Útvísingar: Tjaldur 2 – Kyndil 6

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 11 | 335 | 256 | 79 | 20 |
| 2 | Tjaldur | 11 | 310 | 245 | 65 | 17 |
| 3 | Neistin | 11 | 301 | 258 | 43 | 17 |
| 4 | Kyndil | 11 | 272 | 260 | 12 | 10 |
| 5 | VB | 11 | 271 | 283 | -12 | 9 |
| 6 | VÍF | 12 | 276 | 343 | -67 | 4 |
| 7 | StÍF | 11 | 210 | 330 | -120 | 1 |

**StÍF – VB** . . . . . . . . . . . . . . fríggjadagin, 17. desember . . . . . . . . . klokkan 20.00
**Kyndil – Neistin**. . . . . . . . . . leygardagin, 18. desember . . . . . . . . . klokkan 14.30
**Tjaldur – Stjørnan** . . . . . . . . leygardagin, 18. desember . . . . . . . . . klokkan 15.00